

- Okkum dámar sera væl hesar frikadellurnar, sigur Sunrid Sirdal



Martha Sivertsen hevur júst fylt frikadellurnar í eina eskju. Í komandi døgum enda tær á onkrum føroyskum døgurðaborði



Tann stóra og snildisliga innrættaða steikipannan, sum skjótt og væl steikir frikadellur til føroyska marknaðin

# Køldu fri ganga su

**- Hóast eg arbeiði í fiski hvønn dag, og maðurin er sjómaður, so dámar okkum eisini sera væl tað sum vit sjálvi framleiða her á NORÐFRA, - serliga fiskafrikadellurnar, sigur Sunrid Sirdal, flakakvinna í Norðdepli**

FISKAARBEIÐI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Norðdepil:** Tað liggur eingin útróðrarbátur og landar, tá Snoddi kemur oman á havnarlagið í Norðdepli.

Alt andar av friði úti, men inni á virkinum NORÐFRA binda arbeiðsfólkini als ikki frið:

Tey hava í øllum førum úr at gera við at framleiða allar tær vørurnar, sum virkið hevur í útboði sínum til tann føroyska marknaðin.

Í einum rúmi standa tvær kvinnur og steikja fiskafrikadellur og í einum øðrum fýra aðrar og pakka.

- Ja, hesar frikadellurnar frá okkum eru sera væl umtóktar. Tær ganga faktiskt sum heit breyð, sigur Sunrid við einum brosi.

Hon arbeiðir annars mest sum reinskerari, men tá eingin fiskur er til tað, plagar hon at luttaka í øðrum arbeiðum á virkinum.

- Eg havi arbeitt her í trý ár. Og her er gott at vera, sigur 35 ára gamla flakakvinnan í og úr Norðdepli.

**Smakkur og tilgerð**

Er tað nakað sum NORÐFRA hevur lagt seg eftir, so man tað vera, at fiskurin ið kemur út frá virkinum hevur hægstu góðsku.

Dentur verður tí millum annað lagdur á, at fiskurin kemur skjótt til høldar, verður blóðgaður beinanvegin, kemur í ísvatn og verður frystur innan næstu 24 tímarnar.



Tað er sum, tey beinleiðis siga tað á flakavirkinum í Norðdepli, at fiskurin gerst ongantíð betri, enn tá hann er nýfiskaður. Tí er neyðugt við neyvari og skjótari viðgerð.

*»Eg havi arbeitt her í trý ár. Og her er gott at vera«*

Hetta er kanska ein orsøkin til, at Sunrid og øll hini á virkinum hava merkt til eina øktan áhuga frá føroyingum fyri fiskavørum teirra. Konseptið á virkinum er, at fiskavørurnar skulu vera fjølbroyttar, skulu vera vælsmakkandi og harafturat lættar at tilgera heima við hús.

- Ja, vit hava so altíð úr at gera, sigur Sunrid. Hinar í rúminum nikka samtykkjandi.

Hinar tríggjar eru eisini við í